


# Sjúkrarøktarfrøðingur og heilsurøktari til seingjadeildina á Suðuroyar Sjúkrahúsi

## Sjúkrarøktarfrøðingur til seingjadeildina

Søkt verður eftir einum sjúkrarøktarfrøðingi til avloysarastarv í tíðini 1. mars 2018 til 31. januar 2020.

Arbeiðstíðin er 1,0 í øllum vaktum.

**Vit vænta at umsøkjarar:**

- hava prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- hava góð samstarvsevnir og evni at arbeiða sjálvstøðugt
- hava hug og vilja at arbeiða við egnari fakligari menning og førleika
- kenna ábyrgdarkenslu at skapa góðan trivna á deildini
- eru áhugað at undirvísa lesandi og næmingum
- hava telduførleika - vit nýta Cosmic

## Heilsurøktari til seingjadeildina

Søkt verður eftir einum heilsurøktara til fast starv frá 1. mars 2018.

Arbeiðstíðin er 0,5 í øllum vaktum.

**Vit vænta at umsøkjarar:**

- hava prógv og góðkenning sum heilsurøktari
- hava góð samstarvsevnir og evni at arbeiða sjálvstøðugt
- hava hug og vilja at arbeiða við egnari fakligari menning og førleika
- kenna ábyrgdarkenslu at skapa góðan trivna á deildini
- hava telduførleika - vit nýta Cosmic.

**Vit kunnu bjóða:**

- ein áhugaverdan og skiftandi arbeiðsdag saman við góðum starvsfeløgum
- eitt starv við mennandi avbjóðingum
- skipaða innleiðslu

**Setanartreytir:**

Løn- og setanartreytir sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Meira fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Sonny Ellendersen, deildarleiðara ella Gunnbjørg Guttesen, varastjóra.

Umsókn við autorisatión og CV skal sendast til:

Suðuroyar Sjúkrahús
stílað: Ronnie Midjord, sjúkrahússtjóri
Postboks 51
810 Tvøroyri

ella

ssh@ssh.fo

Umsóknarfreist: 25. januar 2018